# Fyrsta sjónvarps-sending

Tað var bretin John Logie Baird, sum framdi fyrstu sjónvarpssending í heiminum. Hetta fór fram í hesum húsinum, sum tá hevði ein slaktarahandil á veghæddini. John Logie Baird bað sonin hjá slaktaranum, 20-ára gamla William Edward Taynton, um at hjálpa sær, og hann sat so í eina rúminum, meðan John sjálvur fór í eitt annað rúm.
Hann sendi so frá eina rúminum til hitt, og tað vísti seg at virka fyrimyndarliga. Hetta var sostatt fyrsta sjónvarpssending í heiminum, og afturfyri fekk slaktarasonurin tveir shillingar. Hann gjørdist sostatt fyrsti lønti sjónvarpsverturin í heiminum.
Hetta fór fram 2. oktober 1925 í hølum hansara á Firth Street í Soho í London. Í dag sæst bert hetta skilti eftir stórhendingini, og slaktarahandilin er heldur ikki til longur.






















